## Fráboðanarskylda

Vit hava øll skyldu til at boða Barnaverndartænastuni frá, um vit kenna til børn / ung, ið liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra sálarligu ella likamligu heilsu og menning. Um tú veitst um onkran, sum hevur tørv á hjálp, kanst tú seta teg í samband við Barnaverndartænastuna. Tú kanst verða ónavngivin.

## Hevur tú tørv á hjálp, ella ert tú í iva um eitthvørt?

Ring ella kom framvið til eitt óbindandi prát.

**Samband:**

Barnaverndartænastan í Vágum
Hammershalmbsvegur 1
360 Sandavágur
T-post: bvt@vaga.fo
Tlf. 34 44 30

Barnaverndartænastan fyri Sørvágs- og Vága Kommunu er at hitta yrkadagar frá kl. 10:00 – 12:00 og frá kl. 13:00 – 15:00. Hevur tú bráðfeingis boð uttan fyri hesar tíðir, verður tlf. 34 44 30 umstilla til vakttelefon.

***Starvsfólk hjá Barnaverndartænastuni hava tagnarskyldu og alt, ið tosað verður um, er í trúnaði.***





# BARNAVERNDAR-TÆNASTAN KANN HJÁLPA

***Hevur tú, tíni foreldur, ella onkur sum tú kennir, tørv á hjálp?***

***Barnaverndartænastan veitir ráðgeving, vegleiðing, stuðul og hjálp til børn, ung og foreldur teirra.***

## Foreldur

Øll foreldur royna eftir besta førimuni at geva børnum sínum ein tryggan og góðan uppvøkstur. Tó so, kunnu foreldur hava avbjóðingar / trupulleikar av t.d. rúsevni ella rúsdrekka, sjúku, hjúnaskilnaði, og øðrum, ið kann ávirka familjulívið og trivnaðin hjá børnunum í styttri ella longri tíðarskeið.



## Børn / ung

Børn og ung kunnu eins og vaksin hava avbjóðingar, ið gera gerandisdagin truplan. Avbjóðingarnar kunnu t.d. verða:

Happing: Ert tú vorðin happað / happaður og kennir teg einsamallan? Tú vilt fegin tosa við onkran um tínar trupulleikar, men veitst ikki rættiliga, hvussu tú skalt bera teg at?

Foreldur við avbjóðingum: Hava foreldur tíni avbjóðingar / trupulleikar við t.d. rúsdrekka- / rúsevnum, sjúku ella øðrum, sum fylla nógv í tínum gerandisdegi?

Óheppið umhvørvi: Hava tú ella vinfólk tíni samband við løgregluna, ella eru trupulleikar við rúsdrekka og / ella rúsevnum?

Kynsligur ágangur / harðskapur: Hevur tú ella onkur, sum tú kennir, verið úti fyri kynsligum ágangi ella harðskapi?

Vanrøkt: Upplivir tú, at tað eru trupulleikar í heiminum, sum gera, at tú ikki trívist?





Eru hesi ella onnur viðurskiftir, sum fylla nógv í tínum gerandisdegi, kanst tú seta teg í samband við Barnaverndartænastuna, og fáa hjálp og vegleiðing. Barnaverndartænastan kann millum annað hjálpa tykkum við:

- Ráð og vegleiðing
- Sálarfrøðiligari hjálp
- Stuðul í heiminum
- Hjálpa við at finna hóskandi útbúgvingarpláss, arbeiðspláss ella líknandi, til børn og ung.
- Hjálpa við at menna frítíðarvirksemi hjá barninum.
- Geva tilboð um umlættingarskipan hjá góðkendum fosturforeldrum.
- Stuðla foreldrum at fáa og fullføra viðgerð vegna sjúku, rúsevnis ella rúsdrekkamisnýtslu, ella øðrum trupulleikum.
- Tilnevna ein fastan persón, ið barnið altíð kann seta seg í samband við, við sínum trupulleikum / avbjóðingum.